LM-099/2023

Fylgiskjal 6

Annika Petersen

Fra: Mads Guttesen <madsgut@olivant.fo>
Sendt: 15. februar 2024 10:55
Til: Annika Petersen
Emne: Fw: uppskot til uppískoyti til lógaruppskotið um "gongd í haga"

------ Videresendt Meddelelse ------
Fra "Mads Guttesen" <madsgut@olivant.fo>
Til umvr@umvr.fo
Dato 15.02.2024 10:42:59
Emne uppskot til uppískoyti til lógaruppskotið um "gongd í haga"

Vinnumálaráði att.: Høgni Hoydal landstýrismaður.

Eg var á fundi í Finsen í gjárkvøldi. Fylgdi við áhuga tjakinum. Men, eftir stendur at partarnir hava grivið seg niður í skotgrøvirnar og tykjast ikki vilja flyta seg.
og tá ber jú ikki til at koma víðari. Skal komast á mál mugu báðir partar flyta seg so einfalt er tað.
Eg haldi at ein møgulig loysn liggur beint frammanfyri nøsuna á tykkum.
Tað krevst bert at tit seta tykkum niður einaferð enn og mýkja støðuna.

Mítt uppskot er at vit seta eina grein afturat í lógina í hevur til endamáls at skapa eina serstaka verju um tey mest sárbæru økini.

Hesi øki eiga at vera nevnd í greinini:
Mykines, Tindhólmur, Drangarnir, Trælanýpan, Saksun, Slættaratindur, Fugloy, Kallsoy, Hestur, Koltur, Skúvoy og Dímunar. (hetta er mítt uppskot)
Kvota av vitjandi á hesum plássum eigur at vera ásett í lógini. Hvussu stór hon skal vera mugu partarnir og fakfólk meta um, tað er jú ymiskt hvussu nógv tey ymisku økini tola.
Eitt serstakt verndargjald skal vera ásett í lógini. Hetta skal nýtast til átøk fyri at verja náttúruna og fugl t. e. Gøtur og hegn o a og til at løna ferðaleiðarar, ið skulu vera við øllum vitjandi.
Krøv eiga at vera sett til hesar ferðaleiðarar viðv. aldri og útbúgving.
Hvussu stórt hetta verndargjald skal vera mugu partarnir eisini semjast um. Bert er umráðandi at hesi bæði: kvota og gjald eru nevnd beinleiðis í lógini.
Hagastýrinum verður álagt at krevja hetta gjald inn og umsita tað. "

Seti tykkum nú saman og vita um tit ikki fáa undirtøku fyri hesum. Eydnast tað, so hevur tú megna tað íð eingin annar hevur megna. Tað er at tú hevur funni eina brúkliga loysn á málinum og samstundis hevur tú veri við til at givið útoyggjunum tað eyka beini at standa á ið kann bjarga framtíð teirra og tað gera liviligari at búleikast har. Og tá er nógv vunni.

Við vón um at hetta skal eydnast tykkum .

LM-099/2023

Bestu heilsanir

Mads Guttesen

Virus-free.www.avg.com